

## Brúgvin fuktbjálvast og asfalterast

Eftir páskir verður farið í gongd við at fuktbjálva og asfaltera Brúnna um Streymin. Arbeiðið byrjar mikudagin 7. apríl og skal eftir ætlan vera liðugt fyrst í juni. Meðan arbeiðið fer fram, verða akfør leidd ígjøgnum við ferðsluljósum. Tá brúgvin er fuktbjálvað, og asfalteringin er farin fram, er arbeiðið við sjálvari koyribreytini liðugt. Tað, ið so er eftir at gera, er at seta upp eina ætlaða gongubrúgv í norðaru síðu, ið verður hálvanannan metur til breiddar. Umframt at tryggja tey ferðandi til gongu, hevur hendan ferðsluábótin tann fyrimunin, at breytin er breiðkað úr sjey upp í slakar níggju metrar. Av hesum fer ein vegøksl burtur av í hvørji síðu, sum hvør verður á leið ein metur breið, skrivar Landsverk á heimasíðu sínu.



*Framyvir verður trygdin vónandi betri á spæliplássunum hjá dagstovnunum í Havn*

# Økja trygdina á spæliplássum

**Trygdin á øllum spæluplássum hjá dagstovnunum í Havn skal vera komin í rættlag komandi ár. Fyrsta stigið hevur verið at senda húsavørðirnir og onnur starvsfólk á trygdarskeið**

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Tórshavnar Kommuna hevur sett sær fyri, at trygdin á øllum spæliplássum á dagstovnum í kommununi koma í rættlag longu í komandi ári. Hetta sigur deildarleiðarin í húsaumsitingini, Harald Bjørgvin, sum hevur verið við til at gera greiðari mannagongdir fyri trygdina á spæliplássum í kommununi.

Higartil hevur ábyrgdin fyri uttandura spæliøkini hjá dagstovnunum ligið so at siga í ongamannalandi, tí ongin hevur havt høvuðsábyrgdina av økinum. Hetta hevur húsaumsitingin gjørt vart við í fleiri ár, og tí hevur sama umsiting nú fingið ábyrgdina av økinum.

### Verið á trygdarskeið

Fyri at minka um vandan fyri óhappum hava húsavørðirnir og trý starvsfólk hjá húsaumsitingini nú verið á skeiði í trygd á spæliplássum. Eisini hava fleiri økisleiðarar í barnaansingini verið á sama skeiði.

Kommunan sigur, at tað ongantíð hevur verið ivi um, hvør skal røkja og gjalda fyri sjálvar bygningarnar, men spæliplássini hava altíð ligið í einari grásonu.

Í sambandi við skeiðini, hava húsavørðirnir og ein góðkendur eftirlitsmaður sýnt nøkur av spæliplássunum. Hetta hepnaðist væl og hevur havt við sær, at kommunan nú setur í verk fastar mannagongdir í sambandi við støðulýsingar.

### Greiðari mannagongdir

Ætlanin er, at starvsfólkið á stovnunum hevur dagliga eftirlitið undir hond, meðan húsavørðirnir leggja leiðina framvið 3. hvørja viku. Harumframt verður eitt árligt eftirlit við einum góðkendum eftirlitfólki á útvaldum stovnum.

Í fjør vórðu einar 4 milliónir krónur settar av til røkt á teimum 26 stovnunum. Mett verður, at tað kemur at kosta 1,5 milliónir krónur at seta spæliplássini í stand, umframt útreiðslur til innrættingar í garðunum.

## FAKTA

Í húsaumsitingini eru tveir byggifrøðingar, ein arkitektur og ein tekniskur sniðgevi. Harumframt eru 30 húsavørðir, harav 10 hava spæliplássini á dagstovnunum undir hond. Stovnarnir fata um 26 bygningar.